# Virðing og vantandi virðing

**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri og formaður í KSF



Nú samráðingarnar millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið skulu fara í gongd, tykist sum um, at næstformaðurin í Pedagogfelagnum hevur fingið sum serliga uppgávu at tosa um vantandi fakliga virðing fyri pedagogum.

Maud Wang Hansen vísir í grein á, at borgarstjórin í Havn og formaðurin í Kommunusamskipan Føroya, KSF, rennur undan ábyrgd og slakar á góðskuni á dagstovnum kring landið, tí at nú skulu dagstovnar ikki longur leiðast av fakfólki, t.e. pedagogum.

Í greinini vísir hon eisini á tað stóra arbeiðið, ið pedagogarnir gera, men alt hetta leggur borgarstjórin, ið eisini er formaður fyri kommunalu arbeiðsgevarunum, sambært næstformanninum einki í.

Lat meg gera púra greitt, at einki rennur formaðurin í KSF ella kommunurnar undan nakrari ábyrgd, og heldur ikki hava kommunurnar nakrar ætlanir um at slaka upp á dygdina, tvørturímóti.

KSF eins væl og KAF – Kommunala Arbeiðsgevarafelagið – hava sýnt stóra ábyrgd við at vísa landsstýrismanninum í almannaog heilsumálum á ein átrokandi trupulleika, sum er, at tað eru ov fáir pedagogar til vaksandi talið av størvum í dagstovnunum kring landið – eisini til leiðarastørvini.

Í hesum sambandi hevur KSF heitt á landsstýrismannin um at brúka sína lógarheimild til at gera eina kunngerð, sum gevur loyvi til undantak frá kravinum um, at leiðarin skal vera pedagogur.

Hetta snýr seg ikki um at sleppa av við pedagogar í leiðslustørvum, men um at tryggja, at dagstovnarnir, í teimum førum tað ikki ber til at fáa pedagogar í leiðarastørv, kunnu seta leiðarar við aðrari skikkaðari, fakliga útbúgving enn pedagogútbúgving.

Kommunurnar hava stóra virðing fyri pedagogfakinum, men kaldi veruleikin er tann, at fáa kommunurnar ikki sett leiðarar í starv, so mugu stovnar lata aftur, og tað kann ikki vera meiningin. Hetta er tí í veruleikanum ein trupulleiki, sum Pedagogfelagið eisini átti at tikið upp innanhýsis – hvat hevur felagið t.d. gjørt fyri at gera tað áhugavert hjá limunum at átaka sær fakligu avbjóðingina at vera leiðari?

Tá næstformaðurin harumframt eisini ákærir borgarstjóran í Tórshavnar kommunu fyri ikki at hava arbeitt fyri at fáa fleiri flokkar tiknar upp á Pedagogskúlanum, so er tað heldur ikki satt. Borgarstjórin hevur gjørt sær tann ómak at vísa landsstýrismanninum í mentamálum á trupulleikan meira enn eina ferð, seinast í skrivi frá 28. september 2004 eftir at býráðið á býráðsfundi samtykti at heita á mentamálaráðið, um at fleiri pedagogar kundu fáa útbúgving í Føroyum, soleiðis at kommunan kundi yvirhalda lógarásettu krøvini um at 2/3 av starvsfólkunum skulu vera pedagogar á hvørjum stovni.

Veruleikin er jú tann, at er tað trupult at fáa sett leiðarar við pedagogútbúgving, so er tað eins trupult at fáa sett pedagogar í vanligu størvini, og hetta er ikki haldbart longur.

Tórshavnar kommuna hevur bygt nógvar dagstovnar seinastu árini – allir bygdir til endamálið, og allir bygdir við námsfrøðiligari ráðgeving. Kommunurnar yvirtóku eitt niðurpínt dagstovnaøki í 2001 og hava eftir stuttari tíð megnað at dagført økið, so bíðilistar næstan ikki eru meira. Nú verður nógv orka brúkt at fáa fakliga innihaldið á eitt hægri støði, men kommunurnar kunnu ikki útbúgva pedagogar. Og hóast landið í morgin hevði sett ferð á at útbúgva fleiri pedagogar, høvdu fleiri ár gingið, áðrenn vit sóu nakran mun.

Tí mugu vit skapa fyribilsloysnir, so at ikki øll onnur skikkað fakfólk verða stygd burtur, bert tí at Pedagogfelagið í ótrúligum, fakligum trongskygni tvíheldur um, at einans ein ávís námsfrøðilig útbúgving er brúkilig á dagstónaøkinum. Vit mugu nevniliga minast til, at dagstovnaøkið er ikki til fyri at tryggja fólki við ávísari útbúgving starv, men fyri at nøkta tørvin hjá børnunum í nútíðar samfelagnum.

Maud Wang Hansen skrivar um dagstovnaøkið sum sosiala økið – ella sum part av sosiala økinum. Rætt er tað, at fyri einum mansaldri síðani, ella væl tað, vórðu barnaansingarstovnar mestsum burturav mettir sum barnaverndartiltøk, sum skuldu hjálpa upp á børn hjá familjum, sum ikki til fulnar vóru førar fyri at taka sær av sínum børnum. Veruleikin hevur tó helst altíð verið, at tey flestu børnini á dagstovnum komu úr púra vanligum familjum, har foreldrini arbeiddu úti, eins og í dag.

Lóggávan hevur eisini ásannað veruleikan, so at dagstovnarnir ikki longur eru í barnaverndarlógini. Hetta hava vit eisini ásannað reint bygnaðarliga í fleiri kommmunum, soleiðis at dagstovnaøkið er partur av mentannarøkinum, ikki av sosiala økinum. Harvið geva vit eisini bygnaðarliga nakrar ábendingar um, hvussu vit hugsa um innihaldið.

Vónandi hongur Pedagogfelagið ikki, sum tað einasta og seinasta, fast í avoldaðu fatanini av dagstovnaøkinum sum eitt stórt barnaverndartiltak. So er illa statt.

**Samanumtikið:**
Kommunurnar renna ikki undan ábyrgd, Maud Wang Hansen. Tvørtur ímóti, orsøkin til stóra tørvin á námsfrøðingum er júst, at kommunurnar tóku ábyrgd og bygdu skjótt út, tá vit yvirtóku hetta niðurpínda økið. Og kommunurnar seta sanniliga fakligu dygdina í hásætið. Tað hevði tí sømt seg betur um næstformaðurin í Pedagogfelagnum tók ímóti útrættu hondini frá kommunum, so vit í felag fáa dagstovnaøkið at virka á høgum fakligum støði við virðing fyri børnunum, sum tað heila snýr seg um. Og ikki bert hugsa um at tvíhalda um egnu fakmørk.

# Landsstýrið undir umsiting í Kyotomálinum

**HERGEIR NIELSEN**



Tjóðveldi hevur í tveimum umførum í hesum árinum skotið upp, at Løgtingið tekur undir við, at landsstýrið beinanvegin tekur øll neyðug stig til at seta Kyoto-frumskjalið í gildi fyri Føroyar, og at samráða seg til eina eginkvotu, ið ásetir, hvussu nógv Føroyar skulu minka sítt CO2 útlát.

Skotið varð upp, at vit beinanvegin settu neyðugu orkuna av til at kanna, hvørji tiltøk eru neyðug fyri at minka útlátið nóg mikið til at samsvara við Kyoto-frumskjalið, og løgdu samráðingarúrslitið fyri Løgtingið til støðutakan. (løgtingsmálini 56/2006 frá 23. januar 2007, og 11/2007 frá 4. september 2007.)

Fyrra málið varð felt av løgtinginum, tí samgongan segði, at landsstýrið arbeiddi við málinum, og seinna málið liggur í rættarnevndini.

19. sept 2007 leggur løgmaður fram tingmál 29/2007 vísandi til, at danska stjórnin skal hava boð úr Føroyum innan mánadagin 24. september 2007, tí tá er evstamarkið hjá Danmark at boða frá mótvegis ST, um Føroyar skulu gerast ein partur av avtaluni hjá Kongeriget Danmark mótvegis Kyotofrumskjalinum.

Tað er at harmast um, at vit fáa hesa tilvildarligu viðgerð av hesum stóra málið og ilt at skilja, hví mælt varð til at fella uppskot okkara, hartá vit í januar mánaði staðiliga vístu á, at málið hevði skund.

Tá ið løgtingsmálini 56/2006 og 11/2007 fingu viðger á tingi um ársskifti og aftur nú um dagarnar, varð løgtingið ikki kunnað um, at ein støða skuldi takast áðrenn 24. septembur 2007.

Landsstýrið hevur tíverri lagt so lítla orku í hetta mál, at tað var ikki vitandi um, at tíðarfreistin var um at ganga út, og kom tí ikki á ting við hesum málið fyrrenn 19. septembur - eftir boðum frá dønum.

Løgmaður segði á s. 43 í løgmansrøðuni 2007, at: "Ein bólkur við umboðum úr m.ø. Innlendismálaráðnum og Løgmansskrivstovuni er settur at fyrireika og lýsa, hvat er neyðugt og gjørligt fyri at fremja eitt samskipað átak á økinum. Henda útgreining verður løgd fyri Løgtingið saman við uppskotinum til samtyktar um at taka av fyrivarni viðvíkjandi Kyotofrumskjalinum."

Løgmaður var tíanverri liggjandi tungt á hesum almenna lyfti sínum til løgtingið, og eingin útgreining varð løgd fyri tingið saman við Kyotomálinum.

Hinvegin síggja vit eina heilt serliga skipan, har løgtingsmál hjá landsstýrinum verða løgd fyri danskar myndugleikar, áðrenn tey verða løgd fyri tingið, og har danskir myndugleikar so sjálvandi kvitta fyri móttøkuna, og tulka løgtingsmálini eftir egnum tykki.

Løgtingmál nr. 29/2007 er sent danska umhvørvismálaráðnum til viðmerkingar, og viðmerkingar ráðharrans eru síðan latnar uttanlandsnevndini undir nevndarviðgerðini.

Viðmerkingarnar í løgtingsmálinum 29/2007 siga einki ítøkiligt um, hvørjar útlátsskyldur Føroyar átaka sær, sigur danska Umhvørvismálaráðið, sum nú er inni í sjálvari løgtingsviðgerðini.

Ráðið vísir tó á, at ráðharrin sjálvur í skrivi frá 16. august 2007, hevur boðað landsstýrinum frá, at ein avtøka av fyrivarninum merkir, at Føroyar binda seg til at skerja útlátið við 8%.

Danska umhvørvismálaráðið sigur eisini, at ein samtykt av málinum vil vera treytað av eini greiðari samtykt, har vit boðað frá, at vit átaka okkum at minka útlátið við 8% í 2008-12 í mun til basisárið 1990, og eisini átaka vit okkum figgjarligu skyldurnar, um farið verður upp um útlátsmongdina upp á 92% av støðinum í basisárinum 1990.

At enda slær ráðharrin fast, at føroyingar í longri tíð hava verið vitandi um, at 24. septembur 2007 er í allarseinastu løtu til at boða frá loyvdu útlátsmongdini fyri 2008-12.

Eingin ivi er tí um, at við samtyktini av hesum máli binda vit okkum til ein niðurskurð upp á 8% í mun til basisárið 1990, afturat vøkstrinum upp á 11% hesi árini, ella tilsamans 19%.

Sum skilst, so er framvegis eingin orka sett av til at kanna hvørji tiltøk neyðug eru, fyri at Føroyar kunnu minka sítt CO2 útlátið, og sum skilst so er tað rættiliga avmarkað, hvørja orku landsstýrið hevur brúkt til hetta mál í heila tikið.

Nú landsstýrið er tikið á bóli, standa vit á berum, so sum danski umhvørvisráðharrin eisini staðfestir í svari sínum til framløgu av løgtingsmál 29/2007.

Einasta ítøkiliga átakið er, at ein arbeiðsbólkur er settur til at koma við einum uppskoti um umlegging av avgjaldinum á akførum, og at ætlanin nú er at raðfesta fyrisitingina á umhvørvisøkinum.

Eingin samlað meting er tí enn gjørd av kostnaðinum í hesum máli.

Í uppskotum Tjóðveldisins varð mælt til, at landsstýrið tók upp samráðingar beinleiðis á millumtjóðastøði til tess at áseta egna kvotu og binda okkum beinleiðis mótvegis altjóða stovnum samsvarandi okkara búsetingarmynstrið, vinnustrukturi, møguligari oljuvinnu, livihátti vm.

Nevnast kann, at Ísland kann økja sítt útlát við 10% og Noreg sítt við 1% í mun til basisárið, meðan Danmark hevur bundi seg til 8%, sum so eisini gerst okkara niðurskurður, uttan at vit í heila tikið hava verið við í nøkrum sum helst.

Fyri ári síðan og aftur nú varð í okkara uppskotum víst á, at bráðneyðugt var at samtykkja í hesum máli, bæði tí vit áttu at taka ábyrgd av umhvørvisøkinum, og tí at treytirnar annars bara herdust, um vit hildu okkum uttanfyri.

Tað er at harmast um, at vit ikki fyri rúmari tíð síðan hava avgreitt hesi viðurskifti eftir egnum fortreytum, so sum Tjóðveldi fleiri ferðir hevur skotið upp, og sum helst einasta land í heiminum nú noyðast undir ein niðurskurð, sum er roknaður eftir fortreytunum og strukturunum í einum øðrum landi.